# Vilja hava fleiri føroyingar til Skotlands

**Lock Ness ódjórið og ein sekkjapípuspælari seta í hesum døgum ein serligan skotskan dám á SMS. Tað er Smyril Line, sum skipar fyri einum skotskum ferðavinnuátaki**

FERÐAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*



*Umboð fyri skotsku ferðavinnuna eru eisini í SMS*





*Oda Andreasen er søluleiðari fyri Føroyar hjá Smyril Line*





*Ein sekkjapípuspælari setti serligan skotskan dám á SMS í morgun*

Skotland er á breddanum hjá Smyril Line í SMS í hesum døgum. Í dag, í morgin og leygardagin verður Smyril Line á torginum í SMS, har fokus verður sett á Skotland.

- Hetta er fyri at fáa fleiri føroyingar at ferðast til Skotlands, sum er eitt sera spennandi land. Har er nógv at uppliva, og tað er bíligt at ferðast higar, greiðir Oda Andreasen, søluleiðari fyri Føroyar, frá.

Á básinum hjá Smyril Line í SMS er eisini umboð fyri Visit Scotland, sum greiða fólka frá ferðamøguleikum í Skotlandi.

Tað var í fjør at Smyril Line tók uppaftur skotlandssiglingina til Scrabster í Norðurskotlandi, har Smyril sigldi í gomlum døgum. Oda Andreasen sigur, at hendan nýggja farleiðin varð væl móttikin, og at nógv fólk nýttu hendan møguleikan. Í ár hava eins nógv fólk bílagt sær ferðaseðlar handanvegin, so Smyril Line væntar sær nógv av hesi nýggju rutu.

Tiltakið hjá Smyril Line í SMS er í dag til kl 17. Í morgin, flaggdagin eru tey á Torginum frá kl 10 til 12 og leygardagin frá klokkan 10 til 19. Lock Ness Ódjórið – sum í eini fittari útgávu vanliga verður kallað Nessie, vitjar eisini í hesum døgum. Nessie fer at ganga runt í SMS og heilsa upp á børnini, og ein sekkjapípuspælari fer eisini at seta ein serligan skotskan dám á tiltakið. Kappingar verða eisini hvønn dag, har til ber at vinna eina bilpakka fyri fýra til Skotlands. Tey trekkja kappingarnar klokkan 15 í dag, klokkan 11 í morgin og kokkan 18 leygardagin.

Tey frá Smyril Line verða eisini í Gongutøguni í Havn í morgin, flaggdagin, har Nessie eisini verður við. Oda Andreasen sigur, at tey fara at hava ein bás við Eik banka í Gongutøtuni – men fara annars ikki at órógva flaggdagshaldið – men at tosa við fólk, sum verða í býnum.










## KIA cee'd

Hesin bilurin er eitt stórt koyriupplivilisi, allur sum hann er. Tú ivast, um tú situr í einum kvikum japanara ella í einum týskum GTI`ara. Heilt einastandandi koyrieginleikar. Eksklusivur komfortur og nógv pláss. Og ikki bara er hann ein prísbumba - hann er eisini ein garantibumba, tí Kia veitir 7 ára Garanti fyri Cee'd, nakað, sum higartil er óhoyrt í bilaheiminum. Kia Cee'd fæst nú eisini sum stationcar ella Sport Wagon.

**úr kr. 184.800**



**Kia Picanto** úr kr. 124.800



**Kia Magentis** úr kr. 224.800



**Kia Carnival** úr kr. 334.800



**Kia Rio** úr kr. 159.800



**Kia Carens** úr kr. 256.800



**Kia Sorento** úr kr. 375.800

## Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins støstu bilframleiðararnar.

Berg Motors Sp/F · Staravegur 1-3 · FO-110 Tórshavn · tel 31 35 35 · www.bergmotors.fo